

LØNARLÆKKING

*– Nú skulu vit í Løgtinginum og landsstýrinum taka eitt sindur av okkara egna medisini, heldur Løgtingsmaður og forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag heldur, at tað er upp á tíðina at tey gera tað*

# Løgtingsmaður vil fegin fara niður í løn

**LØNARLÆKKING Eg havi onki ímóti at fara niður í løn sigur løgtingsmaður, tí tað hevði víst fólki, at vit eru sinnaðir at ganga á odda**

Áki Bertholdsen

– Vit, sum eru uppi í politikki, eiga at ganga á odda, sum góðar fyrimyndir. Tí havi eg als onki ímóti, at lønirnar hjá okkum verða lækkaðar, áðrenn vit áleggja øðrum størri byrðar.

Tað staðfestir formaðurin fyri Sjálvstýrisflokkin, Kári P. Højgaard.

Hann sigur, at tá ið ferð kemur á tingarbeiðið aftur í heyst, er tað als ikki óhugsandi, at Sjálvstýrisflokkurin fer at leggja uppskot fram um at lønin hjá politikarum skal lækka 5% ella enntá 10% um tað skal vera.

– Eg havi onki ímóti, at vit fylgja í fótasporunum á politikarum í summum av okkara grannalondum, sum hava lækkað sína egnu løn fyri at ganga undan sum góðar fyrimyndir í hesum krepputíðum.

## Ganga á odda

Um eitt slíkt uppskot vinnur frama, veit hann ikki, fyrrenn hann hevur kannað tað.

## Fremsta uppgávan er at byggja álitið upp aftur

Men hann heldur, at tað hevur stóran týdning, at politikarar byrja við sær sjálvum, áðrenn teir áleggja borgarunum so stórar byrðar, sum talan verður um í kjalarvørrinum í hesi kreppuni.

– Eg eri fullgreiðir yvir, at hetta eru bara piparnøtur, men tað hevur eitt signalvirði sum vísir, at politikarar eru sinnaðir at ganga á odda í teimum inntrivum, sum skulu gerast.

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum heldur nevniliga, at tað hevur stóran týdning at skapa álit ímillum politikarar og borgarar og at skapa forstáilsi ímillum fólk fyri at tað er neyðugt við inntrivum.

– Men sum støðan er nú, hevur vanliga fólkið onki forstáilsi fyri teimum inntrivum, sum verða gjørd. Fólkið hevur heldur ikki álit á politisku skipanina, og tað verður okkara fremsta uppgáva at byggja tað uppaftur, heldur hann.

Hann vísir á, at ein týðandi partur av røðuni, sum Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag helt á altjóða arbeiðaradegnum, snúði seg júst um hvussu óvilligir politikarar eru at ganga undan at vísa ein góðan vilja til sparing, samstundis sum teir leggja stórar byrðar á onnur, eisini tey, sum hava minst frammanundan.

Hann sigur, at hetta er eitt gott dømi um, hvussu stóran týdning tað hevur, at politikararnir ganga á odda, hóast talan er um piparnøtir.

*aki@sosialurin.fo*

# Upp á tíðina at teir fara niður í løn

**SAMFELAGSSINNI Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag tekur fult undir við, at politikarar fara niður í løn**

Áki Bertholdsen

– Tað er upp á tíðina, at politikarar vísa eitt sindur av samfelagssinni.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya, tekur fult undir við tankanum hjá Kára P. Højgaard um at politakarar skulu niður í løn.

Hon hevur javnan og savnan átalað politikarar fyri at teir ongan vilja vilja vísa til sjálvir at ganga á odda í teimum krepputíðum, sum eru, samstundis sum teir alsamt díkja fólk undir í brúkaragjøldum og avgjøldum, sum hon hevur málborið seg.

Tí tekur hon væl ímóti tankanum hjá formanninum í Sjálvstýrisflokkinum.

– Eg haldi at tað líkist ongum, at politikararnir alla tíðina díkja borgaran undir í sparingum, eykaskatti av alskyns slagi, samstundis sum teir sjálvir ongan vilja vísa yvirhøvur.

## Teir hava ongantíð víst samfelagssinni

Ingeborg Vinther vísir á, at tað verður dýrari og dýrari at liva. Samstundis verða brúkagjøld og avgjøld av øllum handa slagi løgd á borgaran.

– Tað verða fleiri og fleiri byrðar lagdar á borgarnar, men sálvir vísa politikarar ongan vilja til at spara.

Hon minnist, at politikarar hava harmast um, at lønin hjá teimum hækkaði 3% í fjør, akkurát, sum hjá øðrum alment settum.

– Hetta er hykl, tí tað er ongin, sum tvingar teir at taka ímóti eini lønarhækking, sigur hon avgjørd á málinum.

Politikararnir hava ongantíð víst nakað samfelagssinni, so lat teir endiliga vísa nakað sjálvir, sigur hon, so nú heldur hon, at teir skulu bara taka undir við uppskotinum hjá Káa P.Højgard.

Heldur tú, at tað hevði gjørt tað lættari at borgarum at góðtikið sparingar og onnur inntriv, um so var, at politikarar sjálvir vístu vegin og fóru niður í løn?

– Tað veldst um, hvørjar sparingar og teir gera og, hvørji inntriv, teir seta í verk. At teir so ofta leggjast á pensjónistar og aðrar veikar bólkar í samfelagnum, kann ongantíð góðtakast.